# Bera okkum at sum bananrepublik

*Formaður Sambandsfloksins heldur tað vera púra burturvið, at landsstýrið fer at kunna fólkatingið um fullveldisætlanina. Hann vísir á, at talan tá er um einsíðuga kunnan*

John Johannessen

– Tað kemur bert fyri í bananrepublikkum, at ein stjórn fer á fund við parlamentið í einum ørðum landi um politikkin hjá sær. Tí er fundurin millum landsstýrið og fólkatingið seinnapartin púra burturvið.

Edmund Joensen, formaður Sambandsfloksins, heldur, at landsstýrið setur hol á eitt skott, ið eigur at vera vatntætt, tá tað í dag fer at halda kunnandi fund við fólkatingið um samráðingarupplegg føroyinga til ríkisrættarligu samráðingarnar.

Formaður Sambandsfloksins vísir á, at tað hoyrir landsstýrinum til at samskifta við aðrar stjórnir, meðan tað hoyrir løgtinginum til at samskifta við onnur parlament.

Tí hevur Sambandsflokkurin saman við Javnaðarflokkinum sent øllum umboðum á fólkatingi eitt skriv, har andstøðuflokkarnir báðir vísa á sína ónøgd við hendan fund. Teir vísa í skrivinum á, at tað heldur átti at verið løgtingið - har andstøðan eisini er við - ið kunnaði fólkatingið um sjálvstýristilgongdina.

Við í brævinum til donsku fólkatingsumboðini hava Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin sent eitt kunnandi skriv um støðu teirra til spurningin um ríkisfelagsskapin. í hesum skrivi verður víst til tilmælið, flokkarnir í felag gjørdu tá eftir, at fullveldismálið hevði verið til viðgerðar í uttanlandsnevndini.

Edmund Joensen heldur ikki, at landsstýrið fer at fáa nakran fyrimun burtur úr fundinum við fólkatingið seinnapartin. Heldur væntar hann, at arbeiðsháttur landsstýrisins fer at minka um virðingina í Danmark fyri føroyskum politikki.

– Danir vita, at talan er um skeiva mannagongd, tá landsstýrið heldur fund við fólkatingið, og tí fara danskir politikarar at missa ein part av virðingini fyri landsstýrinum og føroyskum politikki, sigur Edmund Joensen.

Formaður Sambandsfloksins vísir eisini á, at tá tað bert er landsstýrið, ið kunnar fólkatingið, er talan um einsíðuga kunning, ið bert vísir hvat ein partur av føroyska fólkinum vil.

– Danir eru væl fyrireikaðir til at viðgera fullveldismálið, og tí er ikki neyðugt við nakrari kunnan, men vit síggja nú enn einaferð, at landsstýrið brúkar nógva orku upp á politiska propaganda, meðan øll onnur mál liggja á láni, sigur Edmund Joensen, sum er púra vísur í, at danskir politikarar eru væl og virðiliga inni í málinum um ríkisrættarligu støðu Føroya.



*Danir vita, at talan er um skeiva mannagongd, tá landsstýrið heldur fund við fólkatingið, og tí fara danskir politikarar at missa ein part av virðingini fyri landsstýrinum og føroyskum politikki, sigur Edmund Joensen*

# Andstøðan til reiðar at kunna

*Jóannes Eidesgaard heldur tað vera skeivt av landsstýrinum at halda fund við fólkatingið um politikkin hjá einum parti av føroyingum*

John Johannessen

Formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, heldur tað vera ógvuliga skeivt av landsstýrinum at fara til fullu politisku breiddina í Danmark, nevniliga fólkatingið, at kunna um politisku ætlanina hjá einum parti av Føroyingum, nevniliga landsstýrinum.

Hetta heldur hann vera at fara aftur um ryggin á mótstøðuliðnum, ið er danska stjórnin. Hann heldur hetta beinleiðis vera at fara yvir um mark og royna at ávirka donsku andstøðuna mótvegis stjórnini, ið skal samráðast við føroyingar um ríkisrættarliga spurningin.

Jóannes Eidesgaard sammetir hesa støðu við, at danska stjórnin br´dliga kom til føroya at halda fund við tingmenn um, hvørja støðu danir hava til samráðingarupplegg landsstýrisins til ríkisrættarligu støðu Føroya.

– Komu danir soleiðis til Føroya á fund við tigfólk, hevði eg kunna hugsað mær at vitað, hvørja støðu landsstýrið hevði til hetta, sigur Jóannes Eidesgaard.

## Mugu kunnast

Jóannes Eidesgaard heldur, at tað er ógvuliga týdningarmikið, at donsku fólkatingsumboðini eru so væl kunnað, sum yvirhøvur møguligt, um støðu føroyinga til fullveldismálið, so tey hava eina vitan at taka støðu út frá. Men hann heldur ikki, at tað er nóg mikið, at fólkatingið verður kunnað um støðu landsstýrissins.

– Andstøðan hevur gjørt vart við, at vit eru til reiðar at kunna fólkatingið um okkara støðu til spurningin um ríkisrættarliga spurningin, um ághugi er fyri tí. Hetta hevði givið fólkatingsumboðunum eitt breiðari grundstøði at tikið støðu út frá, vísir Jóannes Eidesgaard á.

Men Jóannes Eidesgaard heldur kortini, at tann besta kunningin hevði verið, at ein interparlamentariskur fundur hevði verið hildin ímillum løgtingið og fólkatingið um hetta týdningarmikla mál. Hetta hevði verið ein fundur, ið líktist einum aðalorðaskifti, har løgtings- og fólkatingsumboð á sama fundi fingu høvi at sagt sína hugsan og kunnað hvønn annan um ríkisrættarliga spurningin.

## Gevur sítt íkast undir aðalorðaskiftinum

Formaður Javnaðarfloksins, ið eisini hevur sæti á fólkatingi, sigur seg fara at gera sítt til, at danir verða so væl kunnaðir, sum yvirhøvur møguligt um støðu føroyinga til fullveldisspuringin undir aðalorðaskiftinum á fólkatingi hósdagin um fullveldisætlanina.

– Eg eri ikki liðugur við røðuna enn, men teir fimm minuttirnir, eg fái av talutíð, fara at snúgva seg um, hvussu Javnaðarflokkurin heldur, at viðurskiftini millum Føroyar og Danmark verða loyst, sigur Jóannes Eidesgaard.

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur tað vera í fínasta lagi, at andstøðan eisini roynir at kunna danir um, hvat føroyingar vilja á sjálvstýrisleið.

# GSM og internetið tryggjaðu Føroya Tele gott úrslit

*Føroya Tele hevði í 1999 eitt tað besta roknskaparárið nakrantíð. Úrslitið gjørdist 26 milliónir krónur*

Eyðun Klakstein

Føroya Tele ringdi seg út av 1999 við einum góðum roknskaparúrsliti.

Yvirskotið var 26 milliónir krónur, eftir at 7,2 milliónir krónur vóru avsettar til skatt, og 4,3 milliónir vórðu tveittar í landskassan fyri konsessión og raktur av Fjarskiftiseftirlitinum.

Í 1998 var úrslitið 16 milliónir krónur, og tí var talan um fittan vøkstur, og 1999 er eitt tað besta roknskaparliga árið hjá Føroya Tele nakrantíð.

Tvær týðandi orsøkir eru til góða úrslitið. GSM-fartelefonirnar og internetið hava økt munandi um søluna hjá Føroya Tele.

– Í 1998 løgdu vit dent á at dagføra og nýmótansgera tøknina. Stórar íløgur vórðu gjørdar í millum annað GSM-skipanina, uttanlandskapasitetin og at digitalisera fjarðskiftiskervið. Í 1999 kundu vit í stóran mun heysta ágóðan av hesum íløgunum, sigur Andras Róin, stjóri á Føroya Tele.

## Lækka gjøldini meira

Føroya Tele lækkaði gjøldini í 1999, men nýtslan av fartelefonum og internetið er vaksin so nógv, at hóast lækkingina vaks sølan úr 180 og upp í 219 milliónir krónur.

– Vit halda, at tað er umráðandi, at Føroya Tele fær skapt neyðugu fortreytirnar fyri støðugum takstlækkingum, samstundis sum tænastustigið verður hækkað. 1999 vísti, at fyritøkan er á góðari leið, sigur Andras Róin.

Eginpeningurin hjá Føroya Tele er nú 127 milliónir krónur.

Sambært stjóranum ætlar Føroya Tele at gera fleiri íløgur í ár, enn tað vórðu gjørdar í fjør. Í 1997 gjørdu tey íløgur fyri 47 milliónir krónur, í 1998 107 milliónir og í fjør 35 milliónir.

Føroya Tele væntar, at tær lækkingar, sum vórðu gjørdar í gjøldunum 1. februar í ár, fara at hava ávirkan á úrslitið í ár, og Føroya Tele heldur eisini, at økt kapping ár fjarðskiftismarknaðinum fer at ávirka fyritøkuna.



*Andras Róin, stjóri á Føroya Tele, er væl nøgdur við úrslitið í fjør. Mynd: Jens Kr. Vang*

# Samráðast aftur 2. mei

John Johannessen

Landsstýrið og Danska stjórnin hava sett seinnapartin týsdagin 2. mei av til annað umfar av samráðingunum um ríkisrættarligu støðu Føroya.

Fundurin verður, eins og tann undanfarni, í danska forsætismálaráðnum.

Anifnn Kallsberg, løgmaður, sigur, at landsstýrið hevur viðgjørt ymisk uppskot at leggja fyri danir, og er uppskotið, danskir andstøðupolitikarar hava víst á, um at møguligar inntøkur frá einari oljuvinnu skulu nýtast til at rinda skuldina til danir fyri, ikki vera óhugsandi.



# Laksasjúka á Fuglafirði

*Fiskasjúka ILA er staðfest í alibrúki á Fuglafirði. Tað kann ávirka útflutningin negavtivan veg, men vit hava higartil arbeitt skjótt og skilagott, sigur Finnbogi Arge, landsstýrismaður, sum umsitir alivinnuna. Landsdjóralæknin hevur málið um hendur, og tað er hann, sum tekur endaligar avgerðir*

Edvard Joensen

Laksasjúkan ILA er staðfest á alistøðini Alilaks í Fuglafirði. Økið er avbyrgt, og landsdjóralæknin arbeiðir við at finna fram til, hvaðani sjúkan er komin, og hvussu forðast kann fyri, at hon breiðir seg. Fyribils er allur Fuglafjørður avbyrgdur.

Tað var í seinastu viku, at fiskadjóralækni varð boðsendur, tí tað doyði so nógvur fiskur í ringunum. Djóralæknin fekk beinan vegin illgruna um, at kanska var ILA komið í ringin. Royndir vórðu tiknar og sendar til Noregs til kanningar. Úrslitið av kanningunum kom mánadagin, og tað vísti, at royndirnar vóru positivar.

Beinan vegin vórðu tiltøk sett í verk fyri at forða fyri, at sjúkan skal breiða seg, sigur Bjørn Harlou, landsdjóralækni. Tað merkir, at alt økið er avbyrgt, og eingin óviðkomandi sleppur at alibrúkinum yvirhøvur. Tað verið seg fólk, skip ella bátar. Einans teir alibátarnir, sum neyðugir eru fyri at koma at ringunum. Fóðurbátar og brunnbátar skulu eisini haldast burtur, sigur landsdjóralæknin.

Landsdjóralæknin hevur sent øllum alistøðum og virkjum, sum hava við alifisk at gera, skriv, har sagt verður frá støðuni. Samstundis er fyriskipað, hvussu farast skal fram, tá slíkt hendir.

Bjørn Harlou, landsdjóralækni sigur, at tað enn bert er staðfest sjúka í einum ringi á alibrúkinum. Men fryktandi er fyri, at sjúkan er í øllum ringunum, hóast tað enn ikki er staðfest. Talan er um ein influensavirus, sum smittar illa, sigur landsdjóralæknin. Mett verður, at tað minst skal vera ein fjarstøða upp á fýra-fimm kilometrar fyri at sigast kann, at sjúkan ikki smittar millum ringarnar.



*Laksasjúkan ILA er staðfest á alistøð í Fuglafirði. Alt økið er avbyrgt, og roynt verður nú at finna fram til, hvussu sjúkan er komin á støðina ( Tilvildarlig savnsmynd)*

Kannað verður eisini, hvussu smittan kann vera komin. Tað er soleiðis, at Havsbrún flytir alifóður av landinum til Hetlands og Skotlands. So møguleiki er fyri, at skip, sum hava verið har, kunnu hava havt sjúkuna við sær frá smittaðum alibrúkum har niðri, sigur landsdjóralæknin, hóast als einki er, sum váttar hetta enn. Men hann er sjálvandi noyddur at taka allar møguleikar við, sum rímiligt er.

## Mest alifiskur

Sjúkan rakar laks, og síl kunnu eisini ganga við henni, hóast tey ikki verða sjúk, sigur landsdjóralæknin. Eisini er ávíst, at hon finst í sild, hóast tað er rættiliga óvanligt, at villur fiskur gerst sjúkur. Ikki er ávíst, um hon rakar annan villan fisk, sum eitt nú seið, sigur landsdjóralæknin.

At sjúkan finst í sild, gevur beinan vegin orsøk til at halda eyguni við skipunum, sum landa til Havsbrún. Bjørn Harlou, landsdjóralækni sigur tó, at einki er, sum bendir á, at sjúkan er komin tann vegin, og einki forboð verður sett móti landingum til virkið hjá Havsbrún. Hinvegin mugu skip, sum landa í Fuglafirði ikki reinsa tangar í námind av alibrúkunum.

Landsdjóralæknin sigur, at tað fyribils verður sett Havsbrún forboð í móti at útflyta alifóður, til greitt er, um fóðri er púra uttan smittuvanda.

Eisini verður tað helst soleiðis, sigur Bjørn Harlou, at tá Havsbrún aftur fer at flyta alifóður út, verður tað at byrja við flutt úr Fuglafirði við bili fyri at sleppa undan møguligum smittuvanda, sum stendst av skipum, sum sigla millum alistøðir.

## Harmast umstøðurnar

Bjørn Harlou, landsdjóralækni, harmast um, at tann starvsstovan, sum tey hava ynskt at hava til slíkar kanningar sum hesar, ikki er komin enn. Høvdu royndirnar kunnað verðið tiknar í Føroyum heldur enn í Noreg, kundu vit kanska verið eina viku fyrr við úrslitinum og sostatt eisini við teimum tiltøkum, sum setast skulu í verk. Men hann rósar tó viðgerðini, málið hevur fingið frá teimum, sum hava verið uppi í.

Tað sama ger Finnbogi Arge, landsstýrismaður, sum hevur alimál sum málsøki. Hann sigur, at landsdjóralæknin hevur arbeitt ógvuliga skjótt og professionelt.

Finnbogi Arge kann einki siga um, hvørt tað verða sett nøkur onnur tiltøk í verk enn tey, landsdjóralæknin longu hevur sett. Tað er landsdjóralæknin, sum stýrir gongdini, allari sum hon er, sigur landsstýrismaðurin.

Suni Durhuus, stjóri á Vestlax, sum eigur alistøðina Alilaks í Fuglafirði, har smittan er staðfest, sigur, at hetta sjálvandi kemur illa við. Tað verður í øllum førum ein fíggjarligur missur av hesum, sigur hann. Enn er ikki avgreitt, hvussu verður við tryggingum og tílíkum viðurskiftum, sigur Suni Durhuus.

Hann sigur, at verður avgerð tikin um at drepa fiskin, sum er í ringunum, fara tað at ganga einir tríggir mánar til eitt hálvt ár, til fiskur aftur kann setast út. Í løtuni er ein lítil millión laksar í ringunum. Men teir eru ikki búnir at taka enn. Teir viga, sum er, bara umleið eitt kilog stykkið, og tað er bara triðingurin av tí vekt, teir skulu hava, tá teir eftir ætlan skulu takast.

Suni Durhuus vísir annars til landsdjóralæknan, sum er tann, sum hevur málið um hendur.



*Sjúkan á alibrúkinum í Fuglafirði kann í allarringasta føri fáa avleiðingar fyri alt havnarlagið*


GSM frá Føroya Tele



...so ert tú altíð har, tú skalt vera!

Vel tað GSM-haldið, ið hóskar best til tín...

Vanligt hald
1,40 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 115,00 kr.

Vinnuhald
1,60 kr./min. alt samdøgrið • Mánaðargjald: 200,00 kr.

Frítíðarhald
0,90 kr./min. um kvøldið • Mánaðargjald: 75,00 kr.

Vinnuhaldið
Til teirra, sum serliga brúka telefonina um dagin, og sum altíð vilja hava samband við viðskiftafólk og starvsfelagar. Eisini er hópurin av eykatænastum knýttur til haldið, t.d. SMS-tekstboð, vís nummar og dataflutningur.

| Kostnaður fyri vinnuhald | |
|---|---|
| Stovning | 700,00 kr. |
| Mánaðargjald | 200,00 kr. |
| Minuttgjald - dag | 1,60 kr. |
| Minuttgjald - kvøld | 1,60 kr. |
| Uppringingargjald | 0,40 kr. |

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 • Fax 30 30 31 • www.tele.fo